# TÍÐINDI
# FRÁ
# RUNAVÍKAR KOMMUNUSKÚLA



***Modell av nýggja skúlanum***

***Juni 2006***

**Inngangur.**

Aftur er eitt skúlaár runnið, og vit fara í summfrí. Próvtøkan er av, og sum heild hava úrslitini verið góð. Ikki so sjáldan verður spurnartekin sett við, hvat virði er í einum próvtali. Hvat sigur tað um ein næming, at hann fær 8 í eini lærugrein. Svarið er, at hann í eini munnligari lærugrein dugir áleið miðal í mun til hinar næmingarnar í flokkinum og í skrivligum avrikum miðal í mun til allar næmingar í Føroyum, sum hava verið til somu roynd júst hetta árið. Sostatt nýtist sama próvtal ikki at hava júst sama virði á hvørjum ári.

**PISA-kanningin.**

Seinastu tíðina hevur rættiliga nógv verið at hoyrt um sera vánaliga úrslitið, sum føroysku næmingarnir fingu við fyrstu PISA-kanningina, sum føroyingar luttóku í. Vit endaðu á næstniðasta plássi. Fjølmiðlarnir hava gjørt nógv burtur úr, og politikararnir hava boðað frá, at hetta kann ikki endurtaka seg. Her má vend koma í.

Øll kunnu vit vera samd um, at úrslitið var sera vánaligt, og at hetta vísir, at okkara næmingar ikki dugdu tað, sum kravdist fyri at fáa eitt gott PISA-úrslit. Kortini haldi eg, at okkara næmingar duga ein heilan hóp. Teir eru skilagóðir, og royndirnar vísa, at teir eisini klára seg, tá á stendur.

Ósvaraði spurningurin er tí: Hví kláraðu okkara næmingar seg verri enn javnaldrar í øðrum londum? Uttan iva er neyðugt hjá fleiri pørtum at taka í egnan barm og átaka sær sín part av ábyrgdini. Vit sum leiðsla kunnu uttan iva gera eitt betri arbeiði. Hin einstaki lærarin kann uttan iva gera eitt betri arbeiði. Næmingurin kann eisini vera meira ábyrgdarfullur, og tit foreldur kunnu uttan iva eisini átaka tykkum tykkara part av ábyrgdini.

Fólkaskúlalógin, sum skúlin virkar eftir, er meinlík donsku lógini við somu føgru tonkum, sum hon inniheldur. Nevnast kann eindarskúlin, og at skúlin skal vera fyri øll. Hetta er ikki annað enn sjálvsagt, men føroyski myndugleikin tekur ikki tann partin av donsku lógini við, sum ger hetta møguligt – nevniliga tann partin, ið tryggjar teimum, sum hava tørv á hjálp, rættin til at fáa hjálp. Tá spurt verður eftir tímum til at seta eyka tiltøk í verk, er svarið, at ongin peningur er. Neyðugt verður, at politikararnir avseta munandi størri upphædd til fólkaskúlan, um lógin skal virka, sum hon er ætlað. Kortini kann okkurt gerast, sum ikki kostar teir nógvu pengarnar. T.d. eiga vit at gera eina roynd til at bøta um foreldrasamstarvið, fyri at fáa lærararan, foreldrini og næmingin at gera eitt felags átak fyri at lyfta støðið. Hugburðurin er ikki

nóg góður. Vit mugu fáa nøkur amboð, sum loyva okkum at seta krøv til hvønn annan. Hetta eiga vit at fara undir longu við skúla-ársbyrjan.

**NSR-tænastan.**

8. juni var móttøka í Lítla skúla á Glyvrum í samband við, at fyrsta sertænastueindin í Føroyum varð alment tikin í nýtslu. Læraraíbúðin er sett í stand, soleiðis at har eru 4 hugnaligar skrivstovur og eitt fundarrúm. Leingi hevur ynski verið at fáa sernámsfrøðiligu tænastuna, sum Sernámsdepilin veitir, nærri brúkaranum, og er sertænastueindin úrslitið av hesum. Heitið er NSR-tænastan, sum stendur fyri námsfrøðilig- og sálarfrøðilig ráðgeving. Har starv-ast ein samskipari, ein sálarfrøð-ingur, eitt skrivstovufólk og tríggir serlærarar. Telefonin hevur num-marið 479191, og hon svarar hvønn arbeiðsdag frá kl. 09 til 16, undantikið fríggjadag, tá hon svarar til kl. 15.

Frá 1. juni er alt samskifti, sum skúlin hevur havt við Sernáms-depilin viðv. næmingum, bein-leiðis við tænastuna á Glyvrum. Eisini kemur hon at fáa allar upp-lýsingar um næmingar, sum hava verið til kanningar, og verður út frá kanningarúrslitunum før fyri at geva eina skjóta ráðgeving til øll tey, sum annars eru um næmingin. Eisini foreldur, sum hava trupul-leikar, hava møguleikan til at leita sær ráðgeving frá fakfólkunum, sum manna NSR-tænastuna. Ráð-gevingin er ætlað øllum børnum og ungum í aldrinum frá 0 til 18 ár.

Vit heilsa NSR-tænastuni væl komnari og vóna, at hon kann verða skúlanum til mikla hjálp.

**Skúlabyggingin.**

Hóskvøldið 15. juni samtykti Runavíkar býráð ætlanina um at byggja nýggjan skúla í Runavík. Teknistovan hjá Eyðun Petersen, arkitekti, hevur teknað, og byggi-felagið Articon skal gera arbeiðið, sum er roknað at vara í tvey ár.

Ætlanin um at byggja nýggjan skúla í kommununi er fleiri ára gomul. Verandi skúlaskipan við 4 skúlum í 4 bygdum er ikki góð og hevur við sær, at næmingarnir mugu ferðast nógv ímillum skúlarnar. Fakhølini eru spjadd, og bókasavn er bert á Glyvrum. Heldur ikki hava næmingarnir nøktandi umstøður, tá talan er um nýtslu av teldum. Tá nýggi byg-ningurin stendur liðugur, koma vit at hava ein sera framkomnan skúla, ið kemur at lúka tey krøv, sum verandi skúlalóg ásetur. Vit fáa 18 rúmligar skúlastovur, fakhøli til motorlæru, jarnsmíð, træsmíð, evning/hondarbeiði, heimkunnleika, alis/evnafrøði og natúr & tøkni. Eisini fáa vit eitt tónleikahøli, sum er 90 fermetrar, stórt bókasavn, aulu og matstað. Sigast má, at hetta er eitt megnar átak, sum kommunan her ger, og vónandi fer hetta at geva okkum

ein nógv betri skúla, sum ikki bert verður til gagns fyri næmingin, men eisini kemur at skapa ein góðan karm um nógv mentanarlig tiltøk í kommununi.

**40 ára starvsdagur.**

Tá skúlaárið 2005/06 er av, hevur Kaj Aage Troest, hóast hann bert er 63 ár, starvast við Runavíkar skúlaverk í 40 ár. Bert fáum unnist ein so langa tíð á sama arbeiðsplássi. Seinastu nógvu árini er hann tann einasti, sum hevur starvast so leingi við okkara skúla.

Seinnu árini hevur Kaj Aage mest undirvíst í framhaldsdeildini í lærugreinunum støddfrøði og alis/evanfrøði, meðan hann í yngru árum eisini undirvísti í fleiri øðrum lærugreinum m.a. ítrótti.



Eyðkenni fyri Kaj Aage sum undirvísara er, at hann krevur nógv av sínum næmingum, samstundis sum hann eisini krevur nógv av sær sjálvum. Næmingarnir vita, hvar teir hava hann, og hvat hann væntar sær av teimum, og teir vita, at um teir gera, sum sagt verður, so fáa teir optimala úrtøku. Eitt eyðkenni, sum ger, at hann er sera nógv avhildin bæði av næmingum og foreldrum.

Í 1966 – sama árið, sum hann kom higar at arbeiða – stovnaði hann saman við konuni Jóhonnu og Jóhan Kjeld, sum eisini var lærari her, fimleikafelagið Støkk, sum hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri ungdómin her og í bygdunum rundan um Skálafjørðin. Støkk hevur sostatt eisini 40 ára jubileum í ár, og eins og Kaj Aage er tað framvegis virkið og fult á hædd við sínar javnlíkar. Samlaða limatalið liggur um 500, og virkna limatalið man neyvan nakrantíð hava verið hægri enn júst í ár.

Frá skúlans síðu verður ynskt Kaj Aage hjartaliga tillukku við 40-ára starvsdegnum.

**Kunning.**

Tíverri fáa næmingarnir ikki tímatalvuna fyri komandi skúlaár heim við, áðrenn teir fara í summarfrí.

Næmingatalið sær út til at blíva u.l. 465. Miriam Rasmussen og Hans Jacob Lamhauge hava biðið um farloyvi. Í teirra stað koma Dan Lamhauge og Árni Vang.

Judith Jacobsen, sum er í burðarloyvi, kemur ikki aftur fyrr enn u.l. 1. februar, og í hennara stað kemur Katrina Maria Vang.

Skúlin byrjar aftur 14. august.

Næmingum, foreldrum og lærarum verður ynskt eina góða summarferiu.